gult cyan magenta svart



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷5 og ÷2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og landnyrðingi og kavaælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og kavaælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitalagið millum +1 og ÷2 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og sum fráliðir avfall, fyrst sum vátakavi, annars regn. Hitin kemur upp í 1 til 5 stig.



Mynd: Jens Kr. Vang

# Færri ung roykja

ROYKING
*Oda Ellingsgaard*

Upplýsing um vandan, ið stendst av royking tykist ikki at rína við tey ungu í Føroyum. Í hvussu er hevur rúsdrekka og narkotikaráðið staðfest seinastu árini, at tað gerast alt fleiri ung, sum roykja.

Talið á teimum sum hava roynt at roykt í Føroyum var hægri enn í øllum hinum londunum. Í Føroyum hava 84% av 9 floks næmingunum roynt at roykja, samanborið við 69% av næmingunum í miðal í hinum londunum.

Talið á teimum sum hava roykt innanfyri seinastu 30 dagarnar í Føroyum var áleið tað sama sum miðaltali fyri Evropa.

Miðaltølini fyri næmingar í 9 flokkunum í Føroyum vísa at 47% av dreingjum roykja, og 40% av gentunum.

Hetta er ein stórur trupulleiki at so nógv roykja, tí at alt fleiri fólk doyggja av sjúkum sum upprunaliga koma av royking. Tað doyggja uml. 100 fólk um árið av hesum sjúkum.

Kanningar vísa at tað eru meira vaksin enn ung sum roykja. Rúsdrekka og narkotikaráði ætlar at arbeiða meira við at fáa tey ungu til at gevast at roykja.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | ÷1 |
| Aberdeen | 0 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷6 |
| Bergen | ÷2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | ÷1 |
| Helsinki | ÷9 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷7 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 5 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 14 |
| Malta | – |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 6 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1004 hPa. við Lofoten fer suðureftir og lágtrýstið í útsynning úr Íslandi grynnist.




Lágtrýstið við Suður-Noreg stendur mestsum í stað, so høgættin stendur við á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/02 kl. 06⁰⁰–27/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 0,6°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 26/02 kl. 06⁰⁰–27/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 103,5 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

20. febr.: Mánin longst frá jørðini
23. febr.: Tendring
3. mars: Fyrra kvarter
8. mars: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. feb. | 10:07 | 22:26 | 09:07 | 21:26 | 09:22 | 21:41 | — | 12:07 | 00:49 | 13:07 | 08:22 | 20:41 | 07:22 | 19:41 | 10:22 | 22:41 | 11:22 | 23:41 | 09:52 | 22:11 | 11:07 | 23:26 |
| 1. mar | 10.48 | 23.10 | 09.48 | 22.10 | 10.03 | 22.25 | 00.26 | 12.48 | 01.26 | 13.48 | 09.03 | 21.25 | 08.03 | 20.25 | 11.03 | 23.25 | — | 12.03 | 10.33 | 22.55 | 11.48 | — |
| 2. mar | 11.35 | — | 10.35 | 23.01 | 10.50 | 23.16 | 01.10 | 13.35 | 02.10 | 14.35 | 09.50 | 22.16 | 08.50 | 21.16 | 11.50 | — | 00.25 | 12.50 | 11.20 | 23.46 | 00.10 | 12.35 |
| 3. mar | 00.01 | 12.37 | 11.37 | — | 11.52 | — | 02.01 | 14.37 | 03.01 | 15.37 | 10.52 | 23.27 | 09.52 | 22.27 | 00.16 | 12.52 | 01.16 | 13.52 | — | 12.22 | 01.01 | 13.37 |

www.sosialurin.fo